VIÐMERKINGAR

# Sjálvboðna fólkið & felagsskapir í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**



Vit hava hópin av familjum við ymiskum heiti í eru eins nógvar sum vit hava ymisku felagsskapir við ymiskum heiti í hava íkandi og passivar/ limir/ útí á bygd og bý.

Tað er tá talan um ítróttin, mentan, list, átrúna, í hava nógv sjálvboði hjálparfólk, í eru um felagshúsið/ hølini/ ið taka sær av at fyrireika og skipað virksemi/ tiltøkini.

Uttan øll hesi sjálvboðnum hjálparfólkini høvdu felagsskapirnir ikki verið lív lagað á bygd og bý kring landið í hava alt at takka teim fyri í skipað fyri slíkum dagliga.

Og so kundi øll hugsa sær avleiðingar av øllum ættarbólkum vóru hesi slept upp á fjall frá børn til fólki upp í árini, ið hava nógv til felags at læra av hvørjum øðrum.

Eg haldi tað vera rætt at hesi sjálvboðnu hjálparfólk fáa eitt herðaklapp úti í øllum ymisku felagsskapunum á bygd og bý í hvørjari kommunu í hvørjari oyggj ídag.

Bygdar- & summarstevnur skula kunna draga nógv fólk aftur at sær til øll skipað tiltøk, iðskula fáa feløgunum pening at fíggja og reka teirra virksemi sum áðurnevnt.

Tí haldi eg ikki at slíkar stevur skula hava tað kristiliga við í skráunum í draga fólki frá ítróttar tiltøkunum sjálvboðna fólki hevur lagt nógva tí pening orku í at skipað fríkirkjur/ samkomur/ skipað sínar egnu stevnur/ fundar/ møtirøðir/ tá er ítróttur ikki ein partur av slíkum virksemi, tá hugsað verður um tørvin at fáa neyðuga motión.

Hetta er ikki minst galdandi tá ymisk onnur tiltøk eru á bygdar- og summarstevnu, skráunum, í einki hevur við ítróttin at gera í síni heild í draga fólk frá ítrótta tiltøkum.

Vit skula fáa greiðan skilna millum allan ítrótt og átrúna og mentan og tónleik, og halda fólki frá at fáa ovnógv at drekka á ymisku stevnunum, á bygd og bý kring landið.

Vit skula steðga og útihýsa øllum ólevnaði á almennum støðum, og eftirlitsfólkini, skula hava eyguni eftir at alt gongur friðarliga fyri seg eisini tá talan er um løgreglu.

Ítróttur & átrúnaður & rúsdrekka hóskar ikki saman hvat eg áður havi gjørt vart við í lesabrævið fyri fleiri árum síðani, í eiga at vera hildin fráskylt á bygdar- og summarstevnum.

Hetta kan eg altí venda aftur til í samband við bygdar- og summarstevnur & tá talan er um summarfestivalir, v.m í hevur stóran áhuga millum øll ættarlið í fylgja við slíkum.

Foreldur síggjast fylgja við sínum børn, ungdóm, til venjing og kappingar heima og kring landi í væl at merkja í tí dagliga gevur teim gleði og fragd at kunna fylgja teim.

# Valdsnýtsla í fólkaskúlanum

**Fróði Joensen**

Heldur skelkandi at frætta í Degi og Viku 2 juni, at mentamálaráðið finnur tað neyðugt at lýsa kunngerð, ið gevur lærarum heimild at nýta " vald í hóskandi vavi" um næmingar ikki skikka sær.

Í okkara døgum kemur tíbetur sjáldan fyri, at næmingar vera likamliga hartaðir í skúlanum av lærarum, men fer ein tílík orðing av kunngerðini at geva tílíkum lærarum fríari ræsur at nýta vald, sum teir síðani altíð kunnu pástanda var neyðugt sum støðan var.

Hóast uppaling av børnum er ábyrgd foreldranna, hevur skúlin/lærarar eisini ein stóran leiklut mótvegis næmingum at seta normar fyri atburð og samskifti við onnur. Tí mátti heldur verið umráðandi hjá skúlaverkinum at halda fast um, at harðskapur eins og aðrastaðnis í samfelagnum ikki er ein góðtikin verumáti, hvørki hjá næmingi ella lærara. Alt annað er ein glíðibreyt, har eingin veit, hvar vit enda, tí hvør skal meta um, nær valdsnýtslan var hóskandi?

Við størri flokkum, øktu krøvum í nýggju fólkaskúlalógini og vaksandi tali av næmingum við serligum tørvi er tað væl skiljandi, um einstakir lærarir og skúlar kenna seg ikki makta allar uppgávur, men at legalisera valdsnýtslu og harðskap hoyrir fortiðini til, loysir ongar trupulleikar og er undir øllum umstøðum bæði ósømiligt og ómentað.

# Fyrsta gudstænastan í Oasuni

SAMKOMA

*Snorri Brend*

Hoyvík: Sunnumorgunin kl. 11 varð fyrsta gudstænastan hildin í teirri kirkjuni, sum Fríkirkjan Oasan hevur latið byggja á Kirkjustræti í Hoyvík.

Væl av fólki var samankomið til hesa hátíðarligu løtuna, sum var merkt av takksemi yvir at samkoman henda dagin kundi byrja virksemi sítt í egnum bygningi.

Umframt talur og heilsanir, átti sangurin og tón leikurin eisini sín stóra part av tí, sum fór fram henda fyrrapartin.

Í einum seinni blaði greiða vit meiri frá tí, sum fór fram og sum fer at fara fram í hesi kirkjuni.



*Stóri møtisalurin er bæði ljósur og luftigur, og tí vælegnaður til ta virksemið, sum fara skal fram í hesum snøgga bygningi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*